# Starvslønir
## til listaligt og mentanarligt arbeiði

Mentanargrunnur Landsins letur umsøkjarum starvslønir við støði í listaligum og fakligum metingum av verkevni ella verkætlan.

Endamál grunsins er at styðja starv fyri føroyskum máli, bókmentum, list, vísindum og øðrum mentanarmálum bæði hjá leikum og lærdum. Grunnurin skal serliga stuðla tiltøkum og verkætlanum, sum kveikja og menna føroyska myndlist, tónlist, bókmentir, sjónleik og aðra list, sum kann javnmetast við hesar listagreinir.

Starvslønirnar kunnu verða latnar soleiðis:
1 starvsløn galdandi í 3 ár og starvslønir galdandi í 1 mánað til 12 mánaðir.

Upphæddin á starvslønini svarar til læraralønina á fólkaskúlans lønarstigi 21, stigi 1, sum eftir 1. mars 2003 er kr. 20.073,58 um mánaðin.

**Umsóknir skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi 19. februar 2004**

**Umsóknarbløð fáast á heimasíðuni ella á skrivstovuni.**
**Mentanargrunnur Landsins** - Tórgarðsgøtu 42 - FO-100 Tórshavn Tlf. 32 08 42 - fartlf. 21 80 13 - fax 31 19 98
mentan@mentanargrunnur.fo - **www.mentanargrunnur.fo**


LB SERVICE

**Sveisiarbeiði**

Alt sveisiarbeiði innan jarn, rustfrítt og aluminium verður gjørt, bæði umvælingar og smærri arbeiði

LB-Service
v/Lars Bisgaard
tel 422127 / 220957

Sosialurin 341800



Kaj Andreasen & Co
Heilsølu • smásølu • umboð
Tel. 31 56 00 • www.andreasen.fo

**Termodrakt**

- Draktin til byggimeistarar, entreprenørar og sjómenn
- Luksus termodrakt.
- Bláar og svartar við endurskini

TILBOÐSPRÍSUR
**598,-**



Sosialurin 341800


## Avloysari/ barnsburðarfarloyvi

Søkt verður eftir avloysara fyri leiðaran á **Frítíðarskúlanum**, at byrja 5. januar 2004.

Tann, ið søkir, skal hava námsfrøðiliga útbúgving.

Arbeiðstíðin er 31 t.
Løn eftir sáttmálanum FKA/Føroya Pedagogfelagið.

Umsóknir við prógvum og viðmælum skulu vera kommunuskrivstovuni í hendi seinast 28.11.03.

**Sunda Kommuna**
460 Norðskála
Tlf. 422113


— vit flyta fyri virkir, stovnar og privat —

FAROE TRANS
Vøruflutningur
50 69 69

e-mail: faroetrans@email.com

Sosialurin 311820

— Ring og fá eitt gott tilboð —



*Gravarhjálp*

Marknagilsvegur 86
100 Tórshavn

*Tel 311723 - 211723 · Fax 321722*

Sosialurin 341800



**Hyundai Sonata 2.0 bensin**



- Myrkagráur
- Árgang 2002
- Km. 32.000
- El-rútar
- Klimaanlegg v.m.
- Hita í setrunum
- Sera vælhildin

prísur **177.500,-**

Sosialurin 341800

**Rexton RX290 4x4 nýggjur**

Mercedes motorur
2.9 litur
aircondition
el-rútar v.m.



Vørubilur, prísir úr **238.648,-** v/mvg
Persónbilur, prísir úr **311.190,-** v/mvg

**BILVERKSTAÐIÐ**
v/ H.J.Kollsker · á Hjalla · Tlf 31 10 13
Tlf 21 10 13 · Boks 3262 · FO-110 Tórshavn
www.kollsker.com



# Til Sølu
**Mitsubishi 2,5 L300 4x4**

- Árg. 12/96
- Bilurin er í góðum standi
- Lagalig fígging



**Bilfríðkan**
Velbastaðvegur • 110-Tórshavn
Tel. 31 73 00 ella 21 73 00

FIAT

Sosialurin 341800


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3674
**Navn:** Sp/f Gerðið
**Adressa:** 240 Skopun.

**Kommuna:** Skopunar Kommuna
**Stovningardato**: 01.10.2003
**Viðtøkudato:** 01.10.2003
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kr. 80.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
**Stovnari:** Ruth Hentze Olsen, 240 Skopun.
**Stjórn:** Ruth Hentze Olsen, 240 Skopun.
**Tekningarreglur:** Felagið verður bundið við undirskrift av stjóranum. Grannskoðari: Sp/f HanSam, v/ Óla Regin Hansen, Tróndargøta 39, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 01.10.2003 - 31.12.2004
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka koyriskúla umframt aðra vinnu, ið stendur í samband við nevnda rakstur.

*Skráseting Føroya tann 13. november 2003*
*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3675
**Navn:** Sp/f Synergi
**Adressa:** Tvørgøta 1, 100 Tórshavn.

**Kommuna:** Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato:** 11.11.2003
**Viðtøkudato:** 11.11.2003
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:**
**Kontant kr.** 80.000,00 til kurs 100.
**Stovnarar:** Ása Andreasen, Tvørgøta 1, 100 Tórshavn og Annika Andreasen, Pedda við Steinsgøta 7, 100 Tórshavn.
**Stjórn:** Ása Andreasen, Tvørgøta 1, 100 Tórshavn og Annika Andreasen, Pedda við Steinsgøta 7, 100 Tórshavn.
**Tekningarreglur:** Felagið verður bundið við undirskrift av einum stjóra.
**Grannskoðari:** P/F Grannskoðaravirkið Inpact, R. C. Effersørsgøta 26, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 11.11.2003 - 31.12.2004
**Endamál**: Endamál felagsins er at samskipa og skipa fyri tiltøkum, reka handilsvirksemi og vikarvirksemi, umframt annað í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 13. november 2003*
*Kristin Balle*


Sosialurin -har tað hendir

Sosialurin -tað loysir seg

www.sosialurin.fo




# P/F Beta
og
# P/F Kongshavn
**hava fingið nýggj telefonnr.**

| | | |
|---|---|---|
| **P/F Beta** | Tel. 470070 | Fax 470071 |
| **P/F Kongshavn** | Tel. 470070 | Fax 470081 |

**P/F Beta & P/F Kongshavn**
Kongshavn 1
Postboks 111
600 Saltangará

**Toll- og Skattstova Føroya**

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum.

Uppgávur stovnsins eru m.a. at fyrisita
- skattalógina
- tolllógina
- mvg-lógina
- kolvetnisskattalógina
- avgjaldslógirnar,

eins og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økis-skrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja raksturin.

Í Stýrinum, har viðkomandi kemur at starvast, eru 30 starvsfólk.

Lýsingin finst eisini á heimasíðu okkara

www.tollskatt.fo

E-mail:
tollskatt@tollskatt.fo

## Avloysari

Søkt verður eftir avloysara fyri samskiftisfólkið hjá okkum, sum fer í barnsburðarfarloyvi. Tú skalt helst kunna byrja í starvinum skjótast til ber og framm til 15. august 2003.

**Starvið**
Í tøttum samstarvi við stjórnina røkir samskiftisfólkið m.a. hesar uppgávur:
- marknaðarførir Toll- og skattstovuna sum ein tænastustovn
- mennir kunningina til borgaran
- samskipar kunningina til økini
- samskipar uppseting og týðing av arbeiðsgongdum, skjølum, lógum og kunngerðum o.a.m. hjá stovninum
- hevur ábyrgdina av at dagføra heimasíðuna og intranetsíðuna hjá Toll- og skattstovuni

**Førleikakrøv**
- Góðar samskiftisførleikar á føroyskum, donskum og enskum.
- Góðan kunnleika til kunningartøkni
- Góð samstarvsevni og dugir væl at leggja sín egnan arbeiðsdag til rættis

Tað er ein fyrimunur, um umsøkjari hevur royndir frá øðrum slíkum starvi og/ella málsliga útbúgving frá hægri læristovni.

**Setanartreytir**
Løn og setanarviðurskiftir, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, verða eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag.

**Nærri frágreiðing um starvið** kann fáast við at seta seg í samband við Maud Poulsen, samskiftisfólk, á tlf. 352600.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi
**4. desember 2003.**

Toll- og Skattstova Føroya
Postboks 2151
165 Argir

**Vegna Føroya Skiftirætt verða hesar ognir lýstar til sølu**

# Hús í Skálavík

Talan er um eldri hús, bygd úr betong við lágum stjørnutaki í 2 hæddum.

**Húsini eru innrættað soleiðis:**
Ovara hæddin: 4 kømur/sovirúm, stova, køksrúm, wc/bað, gangur.
Kjallari: óinnrættaður.
Húsini treingja til ábøtur.
Grundøki: matr. 1b, Skálavík er 545 m$^2$.

# Hús í Oyndarfirði

Húsini, ið eru bygd í 1947, eru úr betong í 2 hæddum. Tey eru uml. 70 m$^2$ hvør hæddin.

**Húsini eru innrættað soleiðis:**
Miðhædd: gangur, baðirúm, køkur, stova, 3 kømur.
Kjallari: Í kjallaranum eru 2 rúm.
Húsini krevja ábøtur.
Grundøki: matr. 139, Oyndarfirði, er til støddar 448 m$^2$.

Tað stendur skiftiréttinum frítt at velja millum innkomin tilboð og til ongum at taka av.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Fríðu Patursson, advokat, e-mail frp@advlaw.fo

**Advokatskrivstovan**
**Fr. Petersensgøtu 9 · Tórshavn**
Halgir Winther Poulsen , adv.
Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Tlf. 31 11 45

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 588, P/F Guttesen & Staksberg, 100 Tórshavn.

**Viðtøkur broyttar:**
05.05.2003
Lækkan av P/F-peningi viðtikið 05.05.2003 er nú gjøgnumførd.
**Kapitalur:** Kr. 2.340.000,00.

*Skráseting Føroya tann 14. november 2003*
*Kristin Balle*

# Kunngerð
## frá útskiftingarnevndini fyri Hvalvíkar bygd

Næsti útskiftingarfundur verður í róðrarneystinum í Streymnesi mikudagin 19. november 2003 kl. 10.

Á útskiftingarfundinum verða metingin av kommunalu ognartøkuni og endaligur útskiftingarplanur fyri útskiftingina løgd fram.

Útskiftingin verður endað og latin til ákæru.

N. v.
Øssur Á Midjord,
útsk. form.

# Kunngerð

Skattalistin fyri 2002 liggur frammi til alment eftirlit á býráðsskrivstovuni í vanligari skrivstovutíð:

frá 20. november til 8. desember 2003,

báðir dagar íroknaðir.

**Klaksvíkar býráð**

# Skattalistin fyri 2002

Skattalistin fyri Sørvágs Kommunu liggur frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni hvønn gerandisdag frá kl. 8.00 til 17.00 frá 18. november til 2. desember 2003.

**Sørvágs Kommuna**

# Skattalistin

Skattalistin fyri Leirvíkar Kommunu fyri árið 2002 liggur frammi til alment eftirlit á Kommunuskrivstovuni frá 17. november til 28. november 2003, báðir dagar íroknaðir.

**Skrivstovan er opin:**

| | |
|---|---|
| Mánadag–hósdag | kl. 09.00–12.00 |
| Hósdag eisini | kl. 15.00–17.00 |

**Leirvíkar Kommuna**
520 Leirvík

Sosialurin